Úr øðrum heimi

# – Ein vitjan umborð á The World

VITJAN

*Orð og myndir: Heri á Rógvi*



*4037: Fríggdagin lá The World við bryggju í Havn. Smábáturin við síðurnar av er stranfarskipið Ritan. The World er 196 metrar langt.*

Hesi stóru skipini eru javnan at síggja á Havnini um summarið. Tað er kortini okkurt serligt við hesum. Skipið kallast The World, og navnið riggar væl til hendan flótandi heimin av luksus.

Skipið er 43.000 bruttotons. Longdin er 196 m og breiddin 29,8 m. Skipið hevur tólv dekk og kann sigla 18,5 knob. Hetta er tað størsta, sum hevur á Havnini, verri enn so, men hetta er tað fyrsta av sínum slag.

Konseptið hjá The World er, at skipið hevur íbúðir, sum fólk kunnu keypa, soleiðis at tey kunnu hava egnan bústað umborð. 110 íbúðir eru umborð, og tær verða seldar til privatfólk. 40 % av íbúgvunum eru amerikumenn og kvinnur, góð 40 prosent eru evropearar og hini 20 % er ógvuliga blandað. Afturat teimum “fast” búgvandi eru so tey, ið leiga sær eina suitu ella íbúð til ávísar ferðir.

Í mesta lagi eru 320 ferðafólk við skipinum, og manningin telur eins nógv. Tað er ymiskt, hvussu nógv fólk eru við, tí eigararnir av íbúðum koma og fara, sum teir sjálvir vilja.

Skipið er spildurnýtt. Tað sigldi sín fyrsta túr í mars. Skipið ferðast víða og leggur seg eftir at vitja støð so ofta sum gjørligt. Vanliga er steðgurin nakrar dagar, men í Føroyum er steðgurin bert tólv tímar. Skipið hevur áður verið í Duplin, áðrenn tað kom til Føroya. Tá lagt verður frá bryggju í Havn, fer skipið til Reykjavíkar, har steðgað verður góðar tveir dagar, áðrenn leiðin gongur vesturum hav til USA. Skipið verður ikki aftur á okkara leiðum fyrr enn í 2004. Næsta summar verður siglt mest í Suður Amerika. Skipið siglir størstan partin av árinum og leggur eisini hetta ymsum kappingum og hendingum, eitt nú filmsfestivalurin í Cannes og Formel 1 koyringin í Monako.

Miðalaldurin á teimum ferðandi er 55 ár. Gestirnir, tú hittir, eru eldri, ið øll, eins og manningin, eru óvanliga smílandi og fryntlig at hitta.

Kvinnan, sum hevur fingið til uppgáva at fylgja mær, runt, sigur, at teirra gestir fyri tað nógv bert vilja slappa av og nýta lívið umborð. Møguleikararnir eru óteljandi, og gestirnir kunnu fáa alt, teir treingja. Nevnast kann nú, at skipið hevur egið bønarstað. Bert á tveimum støðum á skipinum er loyvt at roykja, og allastaðni er tænastan í topp.

– Vit eru tey bestu av teimum bestu starvsfólkunum, greiðir Angela Jensen, guest manager, frá.

Tað er heldur ikki so langt av leið.



*Stórur dentur verður lagdur á golf umborð á The World. Á hesum teldubanannum kanst tú spæla flestar banar í heiminum, uttan at førka teg stórvegis.*



*4030: Umborð er ein rúgva av barrum og kaffistovum. Her er ein teirra, har fólk vanliga drekka te seinnapartar.*

## Alt

Beianvegin, tú kemur umborð, er tað greitt, at talan er um flótandi luksus. Alt skínur í øllum endum og kantum. Meðan tey ferðandi eru umborð er hópin av møguleikum. Matstovur, barrir og kaffistovur er ein long røð av. Allur matur kann fáast. Skipið hevur egnar handlar, sum mest selja kend designara vørur. Skipið hevur egið Kasino, egnan náttklub, egið bókasavn, egnan tennisvøll, alla heilsuviðgerð og ítróttarvenjing við tveimum svimjihylum. Ikki minst eru tey errin av sínum golf klubba, sum fyllir tað mesta av ovasta dekkinum.

Skipið hevur egna kykmyndahøll og fyrilestarhøli. Áðrenn vitjanina í Føroyum var Jonhard Mikkelsen umborð og greiddi teimum frá um Føroyar. Fyrilesturin varð bandaður og vístur aftur hvønn tíma, so øll kundu hoyra hann.

Tað vildi tikið alla síðuni at greitt frá øllum umborð, tí talan er um óendaliga nógv luksus. Sum í øðrum heimi.



*Ovast uppi bert til gera ymsan ítrótt. Millum annað ber til at spæla tennis.*






# Eingin høgguslokkur verið síðan 1984

**- Eg trúgvi neyvan, at týðandi nøgdir at høgguslokki hava staðið á firðum og sundum seinastu árini, nú eingin veiða hevur verið. Nógvur bátur ferðast aftur og fram á sjónum. Tað vildi tí verið undarligt, um menn ikki høvdu sæð okkurt, um nógvur høgguslokkur hevði verið, sigur Hjalti í Jákupsstovu.**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*



*Hjalti í Jákupsstovu, leiðari á Fiskirannsóknarstovuni, heldur ikki, at nakað er mist, tí eingin roynd hevur verið eftir høgguslokki síðan 1985.*

*- Hevði nógvur høgguslokkur staðið við landið, trúgvi eg, at onkur hevði havt givið sær far um hetta, tí so nógvur bátur ferðast aftur og fram alla tíðina, sigur hann.*

Í grein í Sosialinum í vikuni vístu vit á, at heystið er høgguslokkatíð, og at áhugavert hevði verið, nú grindir hava lagt beinini, um menn høvdu gjørt onkrar royndir at veiða høgguslokk.

Sosialurin hevur spurt Hjalta í Jákupsstovu, leiðara á Fiskirannsóknarstovuni, um skrásett hagtøl eru yvir høgguslokkaveiði inni á føroysku firðunum.

Hjalti sigur, at Hagstova Føroya hevurført tøl yvir veiðina í fleiri ár, og hesi tøl vísa, at besta høgguslokkaárið í nýggjari tíð var árið 1981; tá veiddu vit 2131 tons inni á firðum og sundum. Næstbesta árið var 1984, og tá veiddu vit 1147 tons.

- Tølini vísa annars, at nakað av høgguslokki fekst øll árini, frá 1980 til og við 1984. Í 1980 var veiðan 504 tons, 248 tons í 1982 og 200 tons í 1983.

Hjalti sigur, at eftir at menn høvdu gjørt seg væl út til at fiska høgguslokk í 1985, hendi tað, at hetta árið gjørdist eiðasørt; tá fingu bátarnir bara 2 tons.

- Og síðan er als eingin høgguslokkur fingin, leggur hann aftrat.

Fiskirannsóknarstovan hevur eisini hugt í gomul bløð eftir, hvussu gongdin annars hevur verið.

- Her síggja vit, at bátar veiddu eisini høgguslokk í fimtiárunum, sigur Hjalti.

Nær høgguslokkur er fingin, er eitt sindur misjavnt. Okkurt árið fekst hann í juli, okkurt árið í august og uppaftur okkurt árið í september.

Hjalti sigur, at høgguslokkur er stuttlívaður; hann gerst bert tvey ára gamal, og gýtingin fer fram á Miðatlantsrygginum, helst suður ímóti Assorunum.

### Neyvan nakað mist

Vit spurdu Hjalta, um tað kann hugsast, at nógvur høggurslokkur hevur verið við landið okkurt árið síðan 1984, men at einki er fingið, tí eingin bátur hevur roynt.

- Eg trúgvi neyvan, at so er. Nógvur bátur ferðast aftur og fram á sjónum - og ikki minst inni á firðum og sundum, har høgguslokkur plagdi at standa. Tí vildi tað verið undarligt, um menn ikki høvdu sæð okkurt, um nógvur høgguslokkur var.

Hann útihýsir tó ikki møguleikanum fyri, at nakað kann hava verið okkurt árið uttan, at menn hava givið sær far um tað.

- Tað hevur altíð víst seg, at høgguslokkurin fyrst kemur inn í Sundini norðanfyri, tey árini, hann hevur verið, t.v.s hann kemur norðaneftir. Síðan fekst hann á Borðoyarvík, Fuglafirði, Gøtuvík og at enda inni á Tangafirði.

### Ikki somu ár

Hjalti í Jákupsstovu veit at siga, at bæði í Íslandi og Noregi fáa teir eisini høgguslokk av og á.

- Men tað vísir seg, at høgguslokkurin er ikki fingin tey somu árini í ávikavist Íslandi, Føroyum og Noregi. Hetta hevur so aftur nakað við ferðamynstrið, streymviðurskiftini og búningina at gera, sigur leiðarin á Fiskirannsóknarstovuni.

# Ídnaðarskipini ikki innaftur á grunnin

**- Vit fara ikki at mæla til, at ídnaðarskipini, sum veiða við botntroli, koma innaftur á grunnin sum áður, tí veiðitrýstið er ivaleysa stórt sum er, sigur leiðarin á Fiskirannsóknarstovuni, Hjalti í Jákupsstovu.**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*



*- Tá ið ídnaðarskipini royndu undir Føroyum, kom helvtin av veiðivirðinum at enda frá matfiski, sum skipini fiskaðu, og hesum var eingin meining í, sigur Hjalti í Jákupsstovu.*

Í samrøðu við Sosialin herfyri, segði formaðurin í felagnum Nótaskip, Atli Hansen, at tað, sum í dag hendir við ídnaðarskipunum, sum veiða við botntroli, er, at hesi nú verða "slúsaði" innaftur á grunnin gjøgnum bakdyrnar.

Hesi skip hava sum er eina ávísa kvotu undir Føroyum, og í loyvinum hjá eitt nú Norðbúgvanum er greitt, at svartkjaftur, sum verður veiddur undir Føroyum, skal landast til matna.

### Ikki innaftur

Leiðarin á Fiskirannsóknarstovuni, Hjalti í Jákupsstovu, heldur onga grund vera til at slúsa ídnaðarskipini innaftur á grunnin, sum formaðurin í Nótaskip heldur vera í umbúna.

- Vit fara so ikki at mæla til, at ídnaðarskipini koma innaftur á grunnin, tí eingin sum helst orsøk er til tess. Veiðitrýstið er ivaleysa stórt sum er, og skuldu skipini komið innaftur, hevði í minsta lagi verið neyðugt at broytt fiskidagaskipanina.

Hjalti vísir á, at ídnaðarskipini, sum veiddu hvítingsbróður og annan fisk undir Føroyum, landaðu hesa veiði til ídnað.

- Skipini vórðu keypt út av grunninum miðskeiðis í nítiárunum, og vit fara ikki at mæla til, at tey koma innaftur á grunnin, sigur hann.

Leiðarin á Fiskirannsóknarstovuni sigur, at eitt nú hvítingsbróður og smáur svartkjaftur er føði hjá toski og upsa.

- Men eg ivist tó í, um henda veiða hevði nakran serligan týdning fyri vistskipanina, sigur hann.

### Matfiskur helvtin av virðinum

Hjalti vísir á, at Fiskirannsóknarstovan gjørdi nakrar royndir við rist í trolinum hjá hesum skipum, og tað vísti seg, at til bar at síla ein fittan part av tí fiski útaftur, sum tú ikki vildi hava í trolið.

- Málið við hesum royndum var í fyrsta lagi at fáa hýsuna burtur úr veiðini, og hetta eydnaðist rættiliga væl. Men trupulleikin við veiðini var serliga hýsan, sum er størri enn hvítingsbróður, men kortini er ov lítil til at kryvja.

Leiðarin vísir á, at tað, sum hendi hjá ídnaðarskipunum, var, at helvtin av veiðivirðinum at enda fekst burtur úr matfiskinum, sum skipini fingu.

- Og tá er skjótt, at endamálið við ídnaðarveiðini dettur á gólvið, sigur Hjalti í Jákupsstovu.

# Kvik landar á Kósini mánadagin

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*

Á Kósini í Klaksvík hevur ikki verið so rokasligt, síðan tey byrjaðu aftur at arbeiða eftir summarsteðgin, ið var liðugur fyri 14 døgum síðan.

Adrian Dalsá, stjóri á Kósini, sigur, at tey hava arbeitt nakað av upsa hesa vikuna, og mánadagin væntar hann, at línuskipið, Kvik, kemur inn at landa. Teir royna undir Føroyum.

Hann veit at siga, at onkur línuskip hava verið inni og landað, men at onnur virkir hava keypt hendan fiskin.

### Nýggir fiskidagar

- Hjá onkrum av teimum størru skipunum og útróðrarbátunum vóru fiskidagarnir uppi, men nú eru vit so komin inn í eitt nýtt fiskiár, sigur Adrian Dalsá.

Stjórin á Kósini væntar, at verulig gongd fer á koma á aftur fiskaarbeiði, sum hevur verið heldur slakt, nú alt kemur í rættlag aftur eftir summarsteðgin, og skipini hava fingið nýggjar fiskidagar.